# Kunning frá Faroe Sheep

Aftur í heyst fer Faroe Sheep at savna inn skinn.
**Fyri at skinnini verða tikin, eiga hesi ráð at verða fylgd:**

## Áðrenn fjallgongu/fletting

Djóralæknin skal síggja tøkuseyðin, áðrenn hann verður flettur, tí er týdningarmikið, at vit fáa at vita í góðari tíð, nær tit eru á fjalli, so at okkara djóralækni nær at koma framvið. Sigast skal frá dagin fyri ella um morgunin sama dag, man er á fjalli á tlf. 260026. Vit gjalda djóralæknan.




## Fletting

I. Skinnini skerast út við beinunum. Ikki ”rørforma”.
II. Skorið verður út fyri halanum.
III. Tá skinnið er tikið av, skal roðið venda upp í fyrsta umfari.

## Hagreiðing av skinnum aftan á fletting

Týdningarmikið er, at skinnið verður kølt niður, áðrenn tað verður lagt í rúgvu, annars kemur ylur í og skinnið oyðilegst.
Tá kølt verður niður, skal roðið venda upp 15 min, og síðan leggja roðið niður, ella skorðnar tað.

Veðraskinn og ærskinn taka vit, men onki verður latið fyri hesi. Vit tilskila okkum rætt til at vraka skinn, ið vit ikki halda er søluvøra.

**Faroe Sheep**
**tlf. 260026**